# Havnarmenn og klaksvíkingar leggja til brots mánadagin

**Karl Johansen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag, sigur, at hann væntar ikki, at teir fara at góðtaka at fáa eina minni lønarhækking enn Starvsmannafelagið hevur fingið**

SÁTTMÁLASAMRÁÐINGAR

*Áki Bertholdsen*

– Eg hevði ikki roknað við, at vit fara at góðtaka eina lønarhækking, sum er minni enn tað, sum limirnir í Starvsmannafelagnum hava fingið.

Tað sigur Karl Johansen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag.

Mánamorgunin fara Havnar Arbeiðsmannafelag og tey bæði feløgini í Klaksvík undir samráðingarnar við arbeiðsgevarafelagið um nýggjan sáttmála.

Sostatt kann staðfestast, at arbeiðarafeløgini fara at samráðast í tveimum bólkum. Í hinum bólkinum eru Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðsmannafelag.



*– Havnar Arbeiðsmannafelag er útihýst frá samráðingunum og tí verður alt aftur við tað gamla, sigur Karl Johansen*

## Vildi ikki

Karl Johansen heldur avgjørt, at arbeiðarafeløgini høvdu staðið seg betur við at samráðst í felag.

– Men tað ber ikki til, sigur hann.

Hann sigur, at orsøkin til tað er, at feløgini eru ósamd um, hvussu tey skulu vektast, um spurningurin um eitt nú verkfall, stingur seg upp.

– Tað kann ikki koma uppá tal at Føroya Arbeiðarafelag skal gera av, antin vit í Havnar Arbeiðsmannafelag skulu fara í Verkfall, ella ikki.

Men hann heldur eisini, at orsøkin til, at arbeiðarafeløgini ganga í tveimum, stingur djúpari enn so.

– Rættiligt split kom í arbeiðarararørsluna undir seinastu samráðingunum. Tá fór Føroya Arbeiðarafelag í samhugaverkfall við Starvsmannafelagið, men tað vildu vit ikki. Tað tók Ingeborg Vinther sær so nær, at Havnar Arbeiðsmannafelag og feløgini í Klaksvík ikki sluppu upp í part í samráðingunum.

Karl Johansen sigur, at aftur í ár vórðu stig tikin til at øll feløgini skuldu samráðast í felag.

– Kallað varð til fundar fyrst í mars mánaða at umrøða málið. Bæði eg, og forðmaðurin í Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag talaðu fyri at vit samráaddust saman.

Formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag sigur, at ongin støða varð tikin á tí fundinum, men avtalað var, at nýggjur fundur skuldi vera um málið.

– Hesin fundurin bleiv ongantíð. Ístaðin fingu vit eitt skriv frá Føroya Arbeiðarafelag um, at Føroya Arbeiðarafelag ikki vildi samráðast saman við Havnar Arbeiðsmannafelag, uttan at nøkur grundgeving fylgdi við.

– Tí verða samráðingarnar í ár skipaðar sum í fjør, so at vit samráðast saman við feløgunum í Klaksvík.

Karl Johansen heldur, at tað er spell, at klandur og stríð skal spjaða arbeiðararørsluna í Føroyum.

## Minst tað sama

Annars dugir Karl Johansen illa at siga nakað um, hvussu samráðingarnar verða.

Men hann dugir ikki at hugsa sær, at teir fara at góðtaka eina lønarhækking, sum er lægri enn tann, ið Starvsmannafelagið hevur fingið.

– Starvsmannafelagið er ein samfelagsbólkur, sum hevur havt meiri enn vit. Tí kann eg ikki hugsa mær, at vit fara at góðtaka nakað, sum er verri enn tað, sigur Karl Johansen.

# Altíð nóg mikið av vatni í Vági

**Nýggja reinsiverkið í Vági er eitt dømi um, hvussu fjøltáttað føroyskt vinnulív er nú á døgum**

REINT VATN

*Áki Bertholdsen*

Øll hesi seinastu árini hevur Vágs Kommuna gjørt eitt stórt arbeiði fyri at útvega borgarunum og virkjunum í Vági reint vatn.

Seinasta átakið í hesum sambandi varð framt seinnapartin mikudagin.

Klokkan trý mikudagin varð nýggja reinsiverkið, sum er bygt við brunnin í Gjógvaár, sett til.

Sostatt hevur meginparturin av Vági nú fingið sóttreinsað vatn. Tað einasta, sum er eftir, er ein geiri mitt í bygdini, sum fær vatn úr einum brunni, sum privat vatnfeløg eiga.

Men Jógvan Krosslá, borgarstjóri í Vági, sigur, at vatnrørini eru løgd soleiðis, at tað er klárt hjá teimum privatu vatnfeløgunum at binda í, hava tey áhuga fyri tí, so at øll bygdin fær reint vatn.

Samstundis eru nýggir vatnleiðingar lagdir til allan býin, uttan í einum strekki uppá nakrar fáar hundrað metrar, men tað verður eisini lagt av nýggjum í næstum.

## Føroysk framleiðsla

Nýggja reinsiverkið klárar at reinsa 40 tons av vatni um tíman, ella gott tað, men tað er gjørt klárt til at ein tangi afturat kan setast upp, so at verkið klárar at reinsa 60 tons um tíman.

Vatnið, sum verður reinsað, verður fyrst sílað ígjøgnum fínan sand, áðrenn tað verður UV geislað, so at tað er fullkomiliga reint.

Men tað er dýrt at sóttreinsa vatn: Bara hetta reinsiverkið kostar tvær milliónir, sum tað stendur.

Hini reinsiverkini í kommununi reinsað eini 70 tons av vatni um tíman, so í løtuni hava vágbingar 100-120 tons av sóttreinsaðum vatni til taks um tíman, so tað nøktar tørvin væl og virðiliga.

Umframt at tæna sínum endamáli, er nýggja reinsiverkið í Vági eisini eitt dømi um tað fjølbroytni, sum hóast alt er í føroyskum vinnulívi nú á døgum.

Alt verkið sum tað er, er nevniliga gjørt í Føroyum, av føroyskum virkjum.

Martin Dalá í Vági, gjørdi jørðarbeiðið, Jóanes við Ósagarð, í Vági, gjørdi betong og timburarbeiðið og Tangavirkið hjá Bent Mortensen í Vági, hevur gjørt tangarnar og alt rørarbeiðið. Undirleverandørur hjá honum hevur Nomatek í Havn verið. Nomatek hevur gjørt UV stráliskipanina. Gudmund Larsen í Vági, hevur gjørt elarbeiðið, Talvuvirkið í Gøtu hevur gjørt automatikktalvurnar, Jóannes Thomsen í Fuglafirði hevur gjørt UV-talvuna. Elteknikk í Leirvík hevur eisini gjørt ymsar stýringar og annan elútbúnað.



*– Nýggja reinsiverkið í Vági varð sett til mánadagin. Tað reinsar 40 tons av vatni um tíman og nú er næstan komið undir land at útvega øllum vágbingum reint vatn. Her eru tað f.v. Frank Antoniussen, býarverkfrøðingur í Vági, Jógvan Krosslá, borgarstjóri og Sigmund Olsen úr Porkeri, sum skoða nýggja verkið*

Projekterað verkið hevur Svenn Brimheim hjá verkfrøðingafelagnum hjá Martin E. Leo í Havn.

Hann sigur, at vatnverkið passar seg sjálvt. Tað er gjørt soleiðis, at vatnstøðan og aðrir upplýsingar altíð kunnu síggjast á einum telduskíggja niðri á Kommunuskrivstovuni.

## Ongantíð aftur vatntrot

Hóast Vágbingar nú eru væl fyri til reint vatn, er tað onkuntíð komið fyri, at tað hevur verið vatntrot í Vági, tá ið turkur hevur verið.

Eitt nú høvdu vágbingar onki vatn nakrar dagar seinasta summar.

Men næsta stigið hjá Vágs Kommunu verður nú at útvega meiri vatn so at vágbingum altíð er tryggjað nóg mikið av reinum vatni.

Avtalað er gjørd við SEV um at leggja vatnleiðing niðan í Ryskivatn, so at vatn kann fáast haðani frá í brunnin í Vági, tá ið trot er.

Jógvan Krosslá sigur, at ætlanin er at fara undir tað arbeiðið í ár, so at tað verður liðugt til næsta summar.

– Tá ið tað arbeiðið er liðugt, hava vit vissu fyri, at vit ongantíð aftur fara at mangla vatn- uttan so at Ryskivant eisini tømist og tað støðuna dugi eg ikki at hugsa mær, sigur Jógvan Krosslá.

Øllum teimum, sum á ymiskan hátt mintust meg á mínum sjeyti ára føðingardegi tann 7/4-2001, takki eg hjartaliga.

**Jóannes Heinesen á Lofti, Sandavágur**



# Bygdarskúlin skal styrkjast

*– Í prinsippinum er tað støðan hjá tí sitandi landsstýrismanninum í mentamálum, ið avger lagnuna hjá børnunum á smáu oyggjunum eftir 7. skúlaár, sigur Útoyggjanevndin.*

*Tilvildarlig mynd*



**Bygdarskúlin hevur stóran týdning í menning av smáoyggjasamfelagnum, og tí má hjúklast um hann. Úrvalið av útgerð og undirvísing skal styrkjast, heldur Útoyggjanevndin**

SKÚLI

*Eyðun Klakstein*

Bygdarskúlin hevur stóran týdning fyri smáu oyggjarnar, og tí er umráðani, at umstøðurnar hjá bygdarskúlanum verða betraðar.

Hetta sigur Útoyggjanevndin í nýggja áliti sínum.

– Bygdarskúlin hevur ein stóran leiklut í menningini av smáoyggjasamfelagnum. Tað skal hjúklast um bygdarskúlan, og úrvalið av útgerð og undirvísing má styrkjast – millum annað við at skipa fyri samstarvi millum bygdarskúlan og skúlar á meginøkinum, sigur Útoyggjanevndin.

Nevndin vísir á, at umstøðurnar hjá bygdarskúlanum eru ikki nóg tryggar.

Fólkaskúlalógin tryggjar smáu plássunum fólkaskúla, men bert upp til 7. flokk. Síðani er tað landsstýrismaðurin í skúlamálum, sum í hvørjum einstøkum føri skal taka støðu til, um ein oyggj skal hava framhaldsflokkar.

– Fyri smáu oyggjarnar er tað ein veikleiki, at rætturin til framhaldsdeild ikki er betri tryggjaður í lógini, sigur Útoyggjanevndin í álitinum.

## Foreldrini flyta við

Næmingar í framhaldsdeildunum kunnu flytast í aðrar skúlar, um serligar umstøður gera seg galdandi. Og hesar serligu umstøður eru frítt til tulkingar hjá landsstýrismanninum.

– Í prinsippinum er tað støðan hjá tí sitandi landsstýrismanninum í mentamálum, ið avger lagnuna hjá børnunum á smáu oyggjunum eftir 7. skúlaár, sigur Útoyggjanevndin og vísir á eitt dømi frá Kalsoynni.

Her eru tað sokallað serligu umstøðurnar tær, at Barsskor siglir millum Kalsoynna og Klaksvík bæði á morgni og kvøldi. Tí verða næmingarnir í framhaldsdeildini vístir til skúlarnar í Klaksvík.

– Ein av stóru trupulleikunum, ið standast av, at børnini noyðast av í oynni í skúla á so ungdum árum er, at foreldrini flyta við. Í nógvum førum kenna foreldrini seg noydd at flyta til stórplássið, har børnini skulu ganga í framhaldsdeild, sigur Útoyggjanevndin.

– Fleiri kenna seg eisini ótrygg við at lata børnini einsamøll í meginøkið at búgva. Børnini eru júst í byrjanini av kynsbúningaraldrinum og hava tí serliga tørv á góðum stuðli.

Útoyggjanevndin mælir tí til, at bygdarskúlin fær tryggari karmar, og at umstøðurnar hjá skúlanum á bygd verða betraðar.

# Útbúgva lærara til útoyggjar

**Útoyggjanevndin kemur við hugskoti um at seta saman serliga útbúgving til útoyggjalærarar, sum kunnu fáa serligan stuðul til sína útbúgving**

SKÚLI

**Eyðun Klakstein**

Útoyggjanevndin kemur í sínum áliti við einum hugskoti um øðrvísi útbúgving av fólkaskúlalærarum, sum kann verða við til at styrkja bygdarskúlan.

Flestu fólk á útoyggj eru samd um, at børnini fáa góða undirvísing í bygdarskúlanum, og kanningar hava eisini víst, at hesi børn eru einki aftanfyri onnur børn í størri skúlum.

– Tá ið tað kemur til undirvísing í framhaldsdeildini kann tað vera ein vansi, um skúlin bert hevur ein lærara. Valfakini gerast avmarkað, eins og førleikin hjá lærarunum at undirvísa í øllum fakum kann verða skerdur, tí læraraútbúgvingin byggir á linjugreinar, sum eru tríggjar í tali, sigur Útoyggjanevndin.

## Øðrvísi

Fyri at fáa lærarar til smáu plássini heldur Útoyggjanevndin, at tað kundi verið ein loysn at givið lærara-skúlanæmingum høvi at søkja um legat ella stuðul til at útbúgva seg til at undirvísa á útoyggjaskúla.

– Hendan útbúgvingin kundi so verið eitt sindur breiðari og møguliga eitt sindur øðrvísi samansett enn vanliga læraraútbúgvingin. Treytin fyri tílíkum legati kundi verið, at lærarin bant seg í eitt ávíst áramál at undirvísa á útoyggj, sigur Útoyggjanevndin.

Hetta heldur Útoyggjanevndin kundi verið við til at styrkt um framhaldsdeildirnar á útoyggjum.


# Avbjóðandi sølustarv

Vit søkja eftir einum sølufólki til útflutningsdeildina. Persónurin skal hava dagliga kontakt við okkara kundar, sum eru flestallir føroyskir útflytarar. Tú skalt starvast á høvuðsskrivstovuni hjá Skipafelagnum í Havn og vera ein partur av einum teami.

**Arbeiðið**

Tú fert at arbeiða tætt saman við marknaðarleiðaranum, samskiparanum og hinum fólkunum í útflutningsdeildini. Tú skalt hava kundakontakt pr telefon og vitja kundar, útrokna tilboð, viðlíkahalda og víðariútvikla okkara samstarv við agentar /undirleverandørar í útlandinum, gera marknaðaranalysur og arbeiða við hagtølum.

**Persónslýsing**

- Arbeiðir væl saman við øðrum og í bólki
- Ert fyrikomandi
- Ert kundavinarligur
- Hevur gott yvirblikk
- Kanst orðna fleiri ting í senn
- Dugir væl enskt í skrift og talu
- Kanst laga teg eftir skiftandi arbeiðstíðum



**Tínar royndir**

Tú mást hava áhuga fyri fiskivinnu og vitan um hana. Best hevði verið, um tú hevur royndir frá arbeiði í vinnuni.

Vit hugsa okkum, at tú ert eksamineraður eksportørur, akademiøkonomur, speditørur, eksportteknikari ella okkurt tílíkt. Tú mást duga at arbeiða við Microsoft-telduforritum.

**Tú fært**

Tú fært eitt áhugavert starv við nógvum avbjóðingum í einum góðum arbeiðsumhvørvi, har tú fært møguleika fyri at seta títt persónliga merki á arbeiðið.

Lønin verður eftir avtalu.

**Send tína umsókn**

Um hetta starv hevur tín áhuga, so send okkum eina umsókn við tínum CV, prógvum o.ø. skjótast gjørligt og áðrenn fríggjadagin 4. mai 2001. Skriva til Skipafelagið Føroyar, Eystara Bryggja, P.O. Boks 47, 110 Tórshavn, Att: Tórheðin Jensen. Tel 31 12 25. Um tú hevur onkran spurning um arbeiðið, so kanst tú ringja til Tórheðin.

*Skipafelagið Føroyar varð stovnað í 1919 og er størsta føroyska flutningsfelagið. Skipafelagið Føroyar hevur skip í linjufarti millum Føroyar, Skotland og Danmark. Meginparturin av føroyskum inn– og útflutningi verður fluttur á okkara skipum. Skipafelagið Føroyar veitir eisini aðrar tænastur, sum t.d. agency, supply base og hurð-til-hurð tænastu*

Skipafelagið Føroyar

Skipafelagið Føroyar · Eystara Bryggja · P.O. Box 47 · FO-110 Tórshavn · Faroe Islands · Tel +298 31 12 25 · Fax +298 31 13 13